

# Lena Anderssen í Sjónleikarhúsinum

**Føroyska sangkvinnan Lena Anderssen trýnur nú aftur á pall. Hetta er fyrsta almenna konsertin í føroyska høvuðsstaðnum í skjótt 18 mánaðir**

KONSERT

Lena Anderssen, sum bara spældi eina almenna konsert í Føroyum í fjør – ein útseld konsert í Atlantis í Klaksvík - fer á pall í Sjónleikarhúsinum leygarkvøldið 14. juni. Við sær hevur hon mannin hjá sær Niclas Johannesen á guitara, umframt at onkur gestur verður aftrat.

Tá Lena gav út fløguna »Let Your Scars Dance« í fjør, var hetta við fyrstu føroyskum tónum úr víðagitnu Abbey Road upptøkuhølunum í Onglandi. Føroyingar hava eisini tikið sera væl ímóti nýggjastu fløguni, ið hevur fingið heiðurin at vera kosin »Ársins Fløga« til bæði Planet Awards og av lesarunum hjá Dimmalætting.

Hóast lítið hevur verið at hoyrt til Lenu á føroyskum palli seinasta árið, so var hon á stórari konsertferð kring alt Evropa í fjørheyst, har føroyska sangarinnan var serligur gestur við avstralska artistinum Xavier Rudd. Konsertferðin var útseld, og Lena fekk sera góð skoðsmál. »Suverænt og undirhaldandi« skrivaði stóra týska netsíðan Musicheadquarter eftir Lenusa framførslu í Frankfurt.

Lena, sum í juni verður við á danska Spot Festivalinum, sum partur av Nordic Cowriters, fer seinni í juni at spæla í Danmark og Írlandi eisini. Men fyrst er konsert í góða, gamla Sjónleikarhúsinum á skránni.


# Dámar tær kundatænastu?

## TRYGD leitar eftir fólki til kundatænastuna

**STARVIÐ**
Talan er um spennandi starv, har nakrar av uppgávum tínum verða at avgreiða telefonkundar og kundar, ið støkka inn á gólvið, umframt at røkja umsitingarligar og aðrar fjølbroyttar innanhýsis uppgávur.

**TÚ**
Tú dugir væl at samskifta við kundar á bæði føroyskum, enskum og donskum. Somuleiðis dugir tú væl at raðfesta og at halda ásettar freistir, ert framtøkin, arbeiðir sjálvstøðugt, hevur lætt lyndi, sært tað skilagóða í broytingum og hevur ein fínan sans fyri kundatænastu.

**UMSÓKNIR OG STARVSSETAN**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Finansforbundet. Vit vilja seta starvið sum skjótast, men eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum. Skrivlig umsókn við viðkomandi skjølum, eitt nú starvsroyndum, skal vera okkum í hendi innan 11. juni 2008. Send umsóknina til P/F TRYGD, Att.: Jean Djurhuus, Gongin 7, Postboks 44, 110 Tórshavn, ella til jdj@trygd.fo.

**SOLEIÐIS ER TRYGD**
TRYGD er ein skjótvirkin og slóðbrótandi fyritøka, ið mangan setur dagsskránna í føroyska tryggingarheiminum. TRYGD grundar virksemi sítt á dygd, skjóta avgreiðslu, greiðleika, nýhugsan og lønsemi.

TRYGD er eisini ein sterk og framlítandi eind, ið veit, hvussu týðandi tað er at geva fjølbroyttum og skapandi menniskjum rásarúm. Hjá TRYGD starvast 27 fólk, og vit umseta í dag fyri meira enn 85 mió. krónur um árið.

TRYGD bjóðar tær góðar møguleikar fyri yrkisligari og persónligari menning í einum virknum og nýskapandi toymi. Tú verður við til at flyta felagið inn í framtíðina, og vit síggja tínar persónligu dygdir sum ein týðandi lut í at gera TRYGD enn sterkari.

Kemur tú við?

**LES MEIRA UM STARVIÐ Á WWW.TRYGD.FO**
**UMSÓKNARFREIST ER 11. JUNI 2008**

TRYGD
leitar eftir tær.

SENDISTOVAN


# Handilsskúli í Søldafjarðar skúla

**78 av 180 ungum á bíðilista til miðnámsútbúgving, ið hava fingið avslag vegna plásstrot, fáa nú møguleika at nema sær miðnámsútbúgving hóast alt. Hetta vegna serligt átak**

TÍÐINDASKRIV
*Mentamálaráðið*

180 ung í Føroyum hava vegna plásstrot fingið boð um, at tey ikki kunnu byrja á FHS ella HH á Handilsskúlunum í Tórshavn og Kambsdali eftir summarfrítíðina í ár. Hetta er als ikki í tráð við ynskini ella málsetningarnar hjá samgonguni, og eru óvanlig stig tí tikin, fyri at at bøta um trupulleikan sum skjótast.

Nú nýggjur skúli verður bygdur í Runavík, verður skúlin í Søldarfirði tøkur. Skúlin stóð liðugur í 1993, hevur 6 skúlastovur og allar hentleikar. Avgjørt er tí, at Mentamálaráðið fer at leiga skúlan, soleiðis at møguleiki verður fyri, at taka upp 3 eyka flokkar í ár – 2 FHS og 1 HH. Talan verður sostatt um, at 78 næmingar verða tiknir upp á Handilsskúlanum afturat teimum 312, ið longu eru tikin upp á Handilsskúlunum í Tórshavn og á Kambsdali.

Fyri at tryggja at øll ung, ið hava søkt inn á Handilsskúlarnar í Føroyum verða javnsett, nú nýggjur skúli verður leigaður, fáa 78 tey best skikkaðu á bíðilistanum – uttan mun til bústað – í næstum í boði, at byrja í eyka flokkunum í Søldarfirði.

Leggjast skal afturat, at hetta er treytað av, at játtan fæst til endamálið á fíggjarlógini fyri 2008, ið sum kunnugt ikki er endaliga samtykt á Løgtingi enn.

Skúladepilin í Suðuroy, Fiskivinnuskúlin í Vestmanna og Tekniski skúli í Klaksvík verða allir í nýggjum hami í 2008. Farið er nú undir at byggja nýggjan skúladepil í Tórshavn, og tá hesin er liðugur eigur útbygging av skúladeplinum í Kambsdali at standa fyri tørni. Av tí, at tað ganga nøkur ár, áðrenn hetta verður veruleiki, er alneyðugt við fyribils loysn í Eysturoynni. Skúlin í Søldarfirði er liður í hesi loysn.

»Tað er avgerandi neyðugt, at øll tey ungu, ið ynskja at nema sær miðnámsútbúgvingar í Føroyum, fáa møguleika fyri hesum. Hetta átakið betrar munandi um støðuna, men málið er, at tryggja at allir skikkaðir umsøkjarar fáa møguleika at taka miðnámsútbúgving. Endurskoðaðu miðnámsútbúgvingarnar verða settar í verk í august 2009, og tá eigur at verða ásett í lóg, at allir skikkaðir umsøkjarar skulu verða upptiknir«, sigur Kristina Háfoss, landsstýriskvinna í útbúgvingarmálum.